# Føroyingar manna oljuskrivstovu



*Tey fýra fólkini, sum koma at hava tilknýti til skrivstovuna hjá Agip í komandi tíð fv. Mildrid Jacobsen, skrivari, Ingi Højgaard, stjóri, Ólavur Gregersen, ráðgevi og Ron Lansdell, verkætlanarstjóri fyri Føroyaøkið.*

**Trý av teimum fýra fólkunum á skrivstovuni hjá oljufelagnum Agip eru føroyingar.**

**OLJUFELAG Á BRYGGJUBAKKA**
*Jan Müller*

Italska oljufelagið Agip, sum er partur av risastóra ENI-samtakinum, hevur stórar ætlanir og vónir í Føroyum. Felagið fekk í fjør tilluttað tvey leitiloyvi og ætlar sær undir at bora á sumri 2002. Ron Lansdell, sum dagliga starvast í Aberdeen, er verkætlanarstjóri á nýggju føroysku skrivstovuni hjá felagnum. Tað er hann, sum kemur at standa fyri komandi leiting. Hann hevur ferðast aftur og fram millum Aberdeen og Føroyar nú í meira enn trý ár og er tað ein stórur dagur, nú felagið alment hevur latið upp skrivstovu á Bryggjubakka í Havn. Umleið 15 fólk frá feløgunum hjá Agip í Bretlandi og Danmark vóru við til almennu upplatingina av skrivstovuni.

– Føroyar eru eitt av teimum mongu londunum, har Agip hevur sett sær sum mál at leita eftir olju og gassi. Okkum dámar væl her og halda, at komandi tíðin fer at verða ein stór og spennandi avbjóðing fyri bæði okkum og føroyska samfelagið.

Hann leggur stóran dent á at kunna arbeiða saman við føroyingum og er ikki sørt errin av, at trý av teimum fýra starvsfólkunum, sum í løtuni eru knýtt at skrivstovuni í Havn eru føroyingar. Tey eru stjórin í felagnum, Ingi Højgaard, Ólavur Gregersen, ráðgevi og Mildrid Jacobsen, skrivari. Haraftrat er so Ron Lansdell frá Agip í Onglandi.

Agip hevur bundið seg til at bora ein brunn. Ron Lansdell sigur, at teir eru sera væl nøgdir við prospektið, sum teir hava valt at kalla »Marimas«, ið er ein av persónunum í kendari skaldsøgu. Prospektið er í heimsflokki sigur hann.

Agip hevur 93% í tí loyvinum, har teir skulu til at bora næsta ár. Føroyska felagið Føroya Kolvetni eigur 7% í loyvinum, men kann økja sín part til 22%. Sosialurin skilur, at pláss er fyri øðrum oljufeløgum í loyvinum men Ron Lansdell er tó rættiliga varin at gera viðmerkingar til hetta.

– Latið okkum nú bíða og síggja, hvat hendir.

Ron Lansdell hevur annars stórar vónir til tað ráðgevandi arbeiðið, sum Ólavur Gregersen nú er farin undir. – Vit eru sera væl nøgdir við hann og ivast ikki í, at hansara ráðgeving fer at koma føroyskum virkjum væl við. Vit skulu so gera alt vit eru mentir fyri at skapa honum tær røttu umstøðurnar at arbeiða undir. Vónandi er hetta eitt gott íkast til at fáa føroyskt vinnulív uppí eina komandi oljuvinnu.



*Nógv fólk leitaði sær inn á gólvið hjá Agip á Bryggjubakka, tá almenn móttøka var har hósdagin og ikki minst fólk, sum í sínum dagliga arbeiði koma at hava tilknýti til oljuvinnuna. Her umboð frá Vaktar- og Bjargingartænastuni og Atlanticon saman við Pablo Fiores, leitingarstjóra hjá Agip.*




*Nøkur av oddafólkunum hjá Agip í Onglandi og Danmark saman við føroyskum starvsfólki uttan fyri skrivstovuna á Bryggjubakka.*